# Rundskriv um myndugleika hjá kappingarleiðara og atburð hjá leikarum

*Í samsvari við samtykt á aðalfundinum 31.08.2019 ger nevndin í DSF hesa reglugerð viðkjandi atburði og ítróttaranda:*

Um leikari ikki skrivar dyst, ið hann er settur at skriva og heldur ikki hevur funnið avloysara fyri seg, fær leikarin eina bót á kr. 300,00. Um hetta endurtekur seg, tekur nevndin í DSF málið upp og ásetur revsing/karantenu. Leikari kann ikki taka lut í kappingum undir DSF, um hann hevur bøtur, ið ikki eru goldnar.

## Atburður:

Kappingarleiðarin hevur mynduleika at burturvísa leikarum, sum:

- ikki møta til dyst
- eru ov ávirkaðir til at spæla við skili
- sýna vánaligan ítróttaranda/atburð

Sum dømi um vánaligan ítróttaranda/atburð kunnu nevnast:

- Royna at órógva mótleikara við óviðkomandi tosi, rørslum, ljóðum v.m.
- Larmandi/provokerandi/niðurgerandi atferð.
- Kasta um seg við pílum í illsinni.
- Víst verður annars til lógarverkið hjá DDU

Um leikari verður burturvístur av kappingarleiðaranum, skal nevndin í DSF hava boð um hetta sum skjótast. Nevndin ásetur síðan revsing, ið kann vera bót ella karantena.

Nevndin í DSF hevur eisini mynduleika at taka avgerð í møguligum málum og kærum, sum koma eftir eina kapping. Kærur skulu sendast formanninum í seinasta lagið 24 tímar eftir at kapping er lokin. Nevndin í DSF tekur síðan støðu til kæruna í seinasta lagi eina viku eftir at kappingin er lokin. Nevndin í DSF kann eisini taka mál upp av sínum eintingum, herundir hendingar/atburð á kappingarstaðnum, sum ikki beinleiðis viðvíkja einum dysti. Avgerðir hjá nevndini í DSF kunnu kærast víðari til kæruskipanina hjá ÍSF.